# Bilar

Nr. 225 • mikudagur • 23. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

**BMW 320d Touring**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 4 syl. diesel 163 hk | Eginvekt | 1.350 kg |
| 0-100 km/t | 8,6 sek | Viðførisrúm | 460 litrar |
| Oljunýtsla | 16,9 km/l | Prísur | kr. 465.000, - (vanligur prísur) |
| Dekkstødd | 205/55-16 | | kr. 435.000, - (introduktiónsprísur) |
| Stødd og vekt | | Søluumboð | Sp/f Nordcar |
| Longd | 452,0 cm | | Smiðjugerði 4 |
| Breidd | 181,7 cm | | FO-100 Tórshavn |
| Hædd | 141,8 cm | | Tel. 308080 |

BMW 300-serian Touring :

# Sportsligur og praktiskur stationcar

**Nýggi BMW 300-serian er nú eisini komin í stationcar útgávuni Touring, ið er bæði størri, rúmligari og praktiskari enn forgangarin. Heildarmyndin av bilinum er sum vit kundu vænta - ein gjøgnumførdur bilur í allar mátar**




*Nýggi BMW 320d Touring við smartum og elegantum designi*

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hóast BMW-300 serian í Touring útgávuni er ein størri og rúmligari bilur enn forgangarin, er tó størsti denturin lagdur á koyrieginleikarnar, sum altíð hava verið eitt av eyðkennunum hjá BMW. Hesin koyrir sum ein dreymur, og vegfesti er heilt optimalt undir øllum koyriumstøðum, serliga kemur hetta til sjóndar í svingum. Fyri at lætta um bilin eru partar av undirvogninim gjørdir úr aluminium. Tær ymisku útgávurnar fáast við 16" og 17" hjólum.

Nýggi BMW-300 serian í Touring útgávuni er longri og breiðari enn forgangarin og verður enn sum áður drivin av bakhjólunum. Bilurin er gjørdur sera praktiskur við at t.d. gardinan, ið fjalir tað sum liggur í viðførisrúminum, rullar seg automatiskt saman, tá baklúkan verður latin upp. Eisini kann rúturin í baklúkuni latast upp separat.

Í viðførisrúminum, sum nú er 460 litrar, er einki eykahjól, hetta er helst tí, at bilurin hevur RFT-dekk (Run Flat Tyre) sum standard í øllum útgávunum. Hesi dekk eru gjørd til at kunna koyra eitt strekki upp á minst 80 kilometrar við 80 km/t uttan luft.

Eitt sum eyðkennir alla ta nýggju BMW 300-seriuna er ljóðdoyvingin, sum nú er betrað munandi.

Startlykilin er avloystur av einum elektroniskum start/stopp knøtti, og servostýringin er hydraulisk.

BMW-300 serian í Touring útgávuni fæst við fleiri ymiskum bensin og dieselmotorum. Til dømis er 6-syl. rekkjumotorurin á Touring 325i útgávuni við 218 hk ein tann lættasti motorurin í síni stødd yvirhøvur. Hetta kemur av, at stórur partur av motorinum er gjørdur úr magnesium. Hesin koyrir frá 0-100 km/t upp á 7,2 sek.

Dieselútgávan, Touring 320d við 163 hk, er eisini ein kvikur, vælkoyrandi og økonomiskur bilur. Hann koyrir frá 0-100 km/t upp á 8,6 sekund. Oljunýtslan er einans 16,9 km/l, ið má metast sum sera gott fyri ein bil í hesum klassanum.

Annars fæst Touring útgávan eisini í hesum útgávunum: 320i við 150 hk, 330i við 258 hk, og 330d (diesel) við 231 hk.

Saman við kompakta BMW kvalitetinum og góðu sportsligu koyrieginleikunum, er heildarmyndin av nýggja BMW 3-Touring, tað sum vit kundu vænta - ein gjøgnumførdur bilur í allar mátar.

Bíligasti BMW Touring í 300-seriuni kostar nú kr. 399.000,-, tí fram til 1. januar 2006 eru introduktiónsprísir galdandi fyri alla 300 seriuna, soleiðis at teir eru upp til 35.000 krónur biligari enn vanligi prísurin.







*Nýggi BMW-300 Touring er longri og breiðari enn forgangarin. Bilurin verður framvegis drivin av bakhjólunum.*






*Rúturin í baklúkuni kann latast upp separat*

*Startlykilin er avloystur einum elektroniskum start/stopp knøtti, og servostýringin er hydraulisk*